# Aðalfundur

# hjá

# Kommunufelagnum

# 2017

Kommunufelagið

# Innihaldsyvirlit

1. Vælkomin ... 3
2. At standa saman um felags áhugamál ... 4
3. Fíggjarligi ójavnin millum kommunur ... 5
3.1 Felags áhugamál, men ymiskar fortreytir ... 6
3.2 Felags fíggjarkarmar ... 7
3.4 Samstarv eigur at ganga báðar vegir ... 8
3.5 Búskaparvøksturin endar fyrst og fremst í landskassanum ... 9
3.6 Talgilding ... 10
4. Vælferðaruppgávur og kommunal samstørv ... 11
4.1 At arbeiða fyribyrgjandi ... 12
4.2 Samstarv og stuðul ... 12
5. Aðrar deildir í Kommunufelagnum ... 13
5.1 Barnaverndarstova Føroya ... 13
5.2 SSP ... 14
5.3 Kommunala arbeiðsgevarafelagið ... 15
6. At enda ... 16
7. Skjøl til formansfrágreiðingina ... 18

Lógarmál til hoyringar hjá KF í árinum ... 24
Um Kommunufelagið ... 25
Stýrið 2017 ... 25
Starvsfólkabólkurin 2017 ... 25
Skrivstovan ... 26
Starvsfólk ... 26
Viðtøkur fyri Kommunufelagið ... 27
Viðtøkur fyri Kommunala Arbeiðsgevarafelagið ... 31
Viðtøkur fyri Barnaverndarstovu Føroya ... 35

# 1. Vælkomin

Góðu kommunustýrislimir,

Eg fari at byrja við at ynskja nývaldu kommunustýrunum hjartaliga vælkomin á aðalfundin hjá Kommunufelagnum.

Samstundis fari eg eisini at nýta høvið til at takka undanfarnu kommunustýrunum fyri arbeiðið, tey hava gjørt seinastu fýra árini.

Kommunuvalið í november 2016 vísti okkum, at lokala fólkaræðið í Føroyum hevur tað gott. Valluttøkan var í meðal sløk 84%, sum er met í norðurlendskum samanhangi. Vit kunna somuleiðis staðfesta, at valluttøkan var vaksandi frá 2012 til 2016 í 26 av teimum 29 kommununum. Hetta er ein gongd vit, sum samfelag kunna verða errin um. Flestu av okkara grannalondum hava í nógv ár stríðst við júst øvutu gongdina, har áhugin fyri lokalum valum er minkandi. (sí mynd 1)

Tað merkir, at borgarin í Føroyum hevur áhuga fyri lokalum viðurskiftum. Og hetta ber ikki minst boð um, at borgarar kenna seg at hava veruliga ávirkan á politikkin í lokalsamfelagnum.

Hetta setir eisini krøv til okkum, sum hava fingið í lut at umboða lokala fólkaræðið komandi fýra árini.

Kommunurnar í Føroyum standa fyri stórum avbjóðingum. Týðandi vælferðartænastur eru lagdar kommununum at fyrisita. Tað setir fyrisitingarlig og fíggjarlig krøv til kommunurnar, og krøv til okkum kommunustýrislimir um at stýra væl og við skili.

Gongdin í samfelagnum er góð. Hóttandi fólkafráflytingin, sum var so eyðsýnd fyri nøkrum árum síðani, er steðgað í flestu pørtum av landinum. Fleiri tykjast at velja Føroyar. Positiva avbjóðingin hjá okkum er í dag at hýsa øllum, at skipa karmar og tryggja øllum okkara starvsmøguleikar – og ikki minst at ansa eftir eisini at tryggja teimum, sum taka við eftir okkum, somu góðu umstøður at liva og virka í Føroyum.

At røkka hesum málum gera vit best í einum sterkum felagsskapi.

Eg fari í hesi fyrstu formansfrágreiðing míni at leggja dent á nøkur yvirskipað mál, sum hava týdning fyri okkum, sum varða av kommununum, heldur enn neyvt at ganga í gjøgnum allar smálutir, sum hava verið fyri seinasta árið.

Hjartaliga vælkomin á aðalfund hjá Kommunufelagnum.

## 2. At standa saman um felags áhugamál

29. september í 1967 sendi Klaksvíkar kommuna eitt skriv til kommunustýrini á Nesi, í Runavík, í Gøtu, í Fuglafirði, í Leirvík, í Hvannasundi og á Viðareiði við uppskoti um at gera ein kommunalan felagsskap, við tí endamáli at styðja hvønn annan.

Endamálið hjá nýggja felagsskapinum var at virka fyri at fremja áhugamál, sum vóru felags fyri limakommunurnar, at standa saman um felags áhugamál yvir fyri ríkisstjórn, løgtingi og landsstýri og øðrum innlendis stovnum, at virka fyri størri samstarvi ímillum kommunustýrini, at skipa fyri upplýsing kommunumálum viðvíkjandi, og at skipa fyri fyrilestrum og kjakfundum fyri kommunustýrislimum og kommunalum starvsfólkum um serstakar tættir kommunu arbeiðinum viðvíkjandi. Soleiðis stóð í brævinum í 1967; brævið sum kann sigast at vera byrjanin til Kommunufelagið, sum vit í dag kenna tað.

Ongantíð eydnaðist tó at savna allar kommunur í felagnum – hetta hendi ikki fyrr enn 1. januar í 2014, tá ið Kommunufelagið, sum er ein samanrenning av Kommunusamskipan Føroya og Føroya Kommunufelagi, varð stovnað, og sum nú hevur sína fjórða aðalfund.

Síðani brævið var sent úr Klaksvík, er runnin nærum hálv øld. Stór menning er farin fram í føroyska samfelagnum hesi skjótt 50 árini. Samferðsla og búskapur eru ment nógv, og fólkatalið er farið úr umleið 38 túsund til, at vit í dag á fyrsta sinni hava rundað tey hálvt hundrað túsund.

Búskapar- og fólkavøksturin hevur ongantíð verið størri enn júst nú, og vit hava eina fólkatilflyting fyri fyrstu ferð í fleiri ár.

Inntøkurnar hjá landi og kommunum hava staðið í støðugum vøkstri seinastu 7 árini, og trøini tykjast nærum vaksa inn í himmalin.

Men tørvurin á samhaldsfesti, og tørvurin á at stríðast fyri felags áhugamálum, sum var ætlanin við kommunufelagnum í 1967, er ikki broyttur ella vorðin minni við tíðini, hóast góðu gongdina

Menning av samfelagnum hevur tó ikki verið eins stór og støðug kring alt landið.

Hyggja vit eftir fólkatalinum býtt á sýslur, so síggja vit, at í hesum 50 ára skeiðinum er fólkavøksturin miðsavnaður um miðstaðarøkið – sum natúrligt kanska er, tí hetta er júst sama gongdin, sum vit síggja í grannalondum okkara og í vesturheiminum yvirhøvur. Men vit síggja eisini, at økini sunnanfjørðs hava ein serstakan trupulleika: Gongdin í hesum økjum er hin sama, sum tann vit síggja og hava sæð á útoyggjum í áratíggju. Íbúgvaratalið er lækkað munandi, og fólkasamansetingin skeiklað, tí samstundis sum fráflytingin er stór, velja fá ung fólk at flyta til og aftur til økini. Tað hevur við sær færri fólk í arbeiðsførum aldri, og at ein lutfalsliga størri partur er uttanfyri arbeiðsmarknaðin.

Hetta ger, at fleiri av hesum lokalsamfeløgum ikki eru burðardygg, og vandin er stórur fyri at koma inn í eina ónda ringrás við enn størri fráflyting, afturstigum og við tíðini eini beinleiðis

niðurlaðing. Tað verður sannlíkt úrslitið, um vit – bæði land, kommunur og lokalsamfeløg - eingi inntriv gera.

Felags fyri hesi øki er, at tey ikki hava fast samband til meginøkið í Føroyum. (sí mynd 2)

## 3. Fíggjarligi ójavnin millum kommunur

Ójavni millum øki í landinum er ikki bert, tá ið talan er um fólkavøkstur. Stóru ójavni er eisini í inntøkugrundarlagnum.

Fíggjarligi ójavnin millum kommunurnar verður umrøddur við jøvnum millumbilum, og tey mongu álitini um at umskipa virksemið hjá kommunum, sum serfrøðingabólkar hava gjørt, umrøða og viðgera øll ójavna fíggjarliga grundarlagið hjá kommununum. Eisini Búskaparráðið hevur meira enn einaferð viðgjørt evnið í síni frágreiðing. Stóri búskaparvøksturin seinastu árin hevur havt við sær, at hetta kjakið eina stund ikki hevur verið so virkið, tó at tað enn er sera viðkomandi – kanska meira enn nakrantíð.

Spurningurin um ójavna inntøkugrundarlagið hjá kommununum hevur serliga havt týdning, tá ætlanir hava verið um at leggja kommununum nýggjar uppgávur at fyrisita.

Eitt endamál við teimum mongu álitunum, ið eru skrivað, er júst at leggja grundleggjandi vælferðartænastur sum dagstovnaøkið, barnavernd, eldraøkið og partvíst fólkaskúlar til kommunala geiran. Og tá so hesar grundleggjandi vælferðartænastur verða lagdar kommununum, verður spurningurin um fíggjarligar fortreytir at røkja uppgávurnar nøktandi í øllum økjum í landinum sera viðkomandi og prinsipiellur: Kunna vit sum samfelag góðtaka, at fortreytirnar hjá einum øki í landinum eru munandi verri enn hjá øðrum økjum í landinum, og sostatt góðtaka, at vit sannlíkt fáa verri – ella í øllum førum minni av – eldrarøkt, barnaansing ella barnavernd og minni av yrkisførleika á til dømis hesum trimum økjum í onkrari kommunum enn í aðrari ?

Av hesi orsøk hevur spurningurin um okkurt slag av útjavning millum kommunurnar altíð verið partur av teimum álitum, sum hava viðgjørt kommunala umskipan – uttan at so nógv kortini er hent.

Eitt undantak er, tá eldrarøktin varð løgd kommununum at fyrisita fyri gott tveimum árum síðani. Fyri at byrgja upp fyri ójavnari tænastu valdi løgtingið at leggja eina ávísa útjavning inn í fíggingarleistin, heldur enn bert at broyta skattliga býtið millum land og kommunur, soleiðis sum vanliga hevur verið gjørt.

Til at fíggja eldrarøktina fáa kommunurnar í høvuðsheitum forskattingina av pensjónum, sum fíggjar umleið ¾ av kostnaðinum, umframt at tær fáa endurrindað ávísar skattafrádráttir, sum fíggjar írestandi ¼. Tað er serliga hesin seinni parturin, ið hevur havt við sær eina ávísa útjavning millum kommunurnar. Harumframt fekk Sandoyggin eitt serligt endurgjald, sum

samanumtikið skuldi gjørt, at ikki so stórur ójavni er millum kommunurnar og teirra fortreytir at veita grundleggjandi tænastur á eldraøkinum.

Hóast hetta eina dømið um eitt sindur av útjavning millum kommunur, so er ójavnin tó framhaldandi stórur, men hann broytist. Stóri inntøkuvøksturin í ali- og fiskivinnuni ger, at tað ikki longur fyrst og fremst er høvuðsstaðarøkið við sínum nógvu almennu inntøkum og inntøkum frá tænastuvinnuni, sum hevur eitt inntøkugrundarlag væl omanfyri meðal. Í dag eru tað serliga øki - og harvið kommunur - sum hava nógv virksemi innan fiski- og alivinnu, sum hava stóra øking í inntøkugrundarlagnum.

Sostatt hevði tað í dag ikki verið høvuðsstaðarøkið, sum í mestan mun hevði skulað goldið eina møguliga útjavning millum kommunur, men í størri mun eisini tey øki, ið hava inntøkur frá ali- og fiskivinnu.

Fíggjarligu fortreytirnar hjá kommunum broytast tískil, sum frá líður. Ein kommuna, sum í dag hevur høgar inntøkur, kann í framtíðini verða ein kommuna, sum fer at tørva inntøkur frá eini millumkommunalari útjavningarskipan. ( Sí mynd 3)

Hóast tíðirnar eru góðar og so at siga allar kommunur hava framgongd og hava kunna latið sínum borgarum skattalættar og aðrar ágóðar, so er stórur munur á skattatrýstinum í einstøku kommununum. Føroyingurin kann gjalda frá 16 % í skatti upp til 22,75 %. Ella ein munur á nærum 7 %. (Sí mynd 4)

## 3.1 Felags áhugamál, men ymiskar fortreytir

Kommunupolitikarin er fyrst og fremst valdur at umboða sina kommunu á ein hátt, sum hann metir gevur besta úrslitið. Hetta merkir eisini, at einstøku kommunustýrini arbeiða fyri áhugamálunum hjá tí kommununi, tey varða av.

Tí kann stundum verða trupult í einum felagsskapi sum Kommunufelagnum at gera av, hvørji felags áhugamálini eru, tí áhugamálini hjá einstøku kommununum kunna vera innanhýsis mótstríðandi.

Hetta kom eitt nú til sjóndar í sambandi við samráðingarnar um, hvussu eldraøkið skuldi fíggjast. Fíggingarleisturin, sum semja varð gjørd um, hevur størri fyrimunir í sær fyri nakrar kommunur enn fyri aðrar. Serliga tær kommunur, sum frammanundan eru meint raktar av, at hava nógvar borgarar, sum arbeiða undir serskattaskipanum, fáa fyrimunir. Úr einum yvirskipaðum sjónarhorni ein skilagóður fíggingarleistur; men fyri tær kommunur, sum høvdu havt fyrimun av heldur at broyta skattin millum land og kommunur, var hetta ikki at meta sum ein góður fíggingarleistur.

Tí er tað skyldan hjá okkum, sum í felag varða av kommununum, altíð at síggja kommunala geiran í síni heild – ikki bert út frá egnum útgangsstøði, men eisini út frá einum

heildarsjónarmiði, soleiðis at kommunurnar í Føroyum altíð hava áleið javnbjóðis umstøður at virka undir.

## 3.2 Felags fíggjarkarmar

Tá landsstýrið í ár legði fram játtanarkarmarnar fyri 2018-2022, kom fíggjarmálaráðið á fyrsta sinni við einum ítøkiligum tilmæli um at samskipa búskaparkarmarnar hjá landi og kommunum. Í játtanarkørmunum verður tí mælt til yvirskipaðan rakstrarvøkstur og íløgukarm hjá kommununum næstu árini.

Kommunurnar verða nú mettar at vera ein so týðandi partur av føroyska búskapinum, at neyðugt er, at land og kommunur í størri mun samskipa fíggjarpolitikkin. Endamálið er at skapa fortreytir fyri, at land og kommunur í størri mun kunnu fremja neyðug átøk at tryggja eina støðuga búskapargongd, og í størri mun at tryggja javna framgongd í øllum landinum.

Mælt verður til, at kommunurnar í fíggjarætlanunum fyri 2018 leggja seg eftir, at rakstrar-útreiðslurnar ikki vaksa við meira enn teimum 1,5% prosentunum umframt lønarvøkstur, ið játtanarkarmarnir hjá landinum eisini leggja upp til.

Sambært Fíggjarmálaráðnum kann væntast, at útreiðslur til íløgur samanlagt verða umleið 5-600 mió. kr. í 2017 og 2018. Mælt verður til, at kommunurnar samanlagt leggja seg eftir, at íløgur eftir hetta samanlagt verða á umleið kr. 400 mió. um árið, sum samsvarar við meðal íløgustøðið hjá kommununum samanlagt seinnu árini.

Kommunufelagið hevur higartil ikki tikið undir við felags íløgu – og rakstrarkarmum, hóast felagið sjálvsagt sær vandan fyri, at búskapurin verður ovurupphitaður, og tískil eisini sær skynsemi í, at samlaði almenni geirin heldur aftur í góðum tíðum.

Kommunurnar virka longu við nógvum ymsum avmarkingum í síni fíggjarstýring. Kommunurnar hava t.d. ikki heimild at spara upp pening ella til at skylda meira enn eina álíkning. Hesar avmarkingar tryggja, at kommunurnar ikki kunna koma sær í sama fíggjarliga óføri, sum vit upplivdu síðst í 80-árunum og fyrst í 90-árunum. Men hetta merkir samstundis, at kommunubúskapurin í stóran mun er neyvt tengdur at góðum og minni góðum tíðum. Tað vil siga, at størri íløgur kunnu bert gerast í góðum tíðum, tá inntøkurnar í kommunukassan eru góðar, og bert smærri íløgur í ringum tíðum. Skipanin leggur upp til, at so er.

Landsmyndugleikar hava hinvegin góðar møguleikar at leggja pening til síðis í góðum tíðum og at gera íløgur í verri tíðum. Men tað krevur sjálvsagt politiskan vilja og dirvi at halda aftur, tá ið tað gongur væl í samfelagnum.

Seinastu árini eru sum sagt stórar og fíggjarliga tungar vælferðaruppgávur lagdar kommununum at fyrisita, umframt at kommunurnar í stóran mun eisini skulu skapa umstøður fyri vinnu og trivnaði. Tilsamans er talan um bæði íløgu- og rakstrartung øki.

Harumframt verða strong krøv við tíðarfreistum sett kommununum viðvíkjandi renovatión, vatnveiting og spillivatni. Hetta eru lógarfestar uppgávur, sum kommunurnar ikki uttan víðari kunna niðurraðfesta.

Kommunurnar raðfesta tí longu millum hópin av íløgum, sum eru neyðugar og lógarásettar.

Er ætlanin, at fíggjarliga frælsið hjá kommununum at gera hesar raðfestingar skal avmarkast, merkir tað, at kommunurnar noyðast at lækka tænastustøðið, og tað fer fyrst og fremst at raka trivnaðin hjá borgarunum.

Sambært frágreiðing frá Búskaparráðnum er tað fyrst og fremst landskassin, ið eigur trupulleikan av ovurupphitaðum búskapi. Sambært íløguætlanini hjá landinum vaksa íløgurnar fram til 2018, tá ið tær verða 730 mió. kr. Síðani minka tær niður um 250 mió. kr. í 2022. Hetta mugu sigast at vera sveiggj, sum vilja nakað. Íløgurnar hjá kommununum fara hinvegin at vera rættiliga støðugar øll hesi árini á umleið 300 til 400 mió. kr. um árið – hetta hóast kommunurnar hava yvirtikið stór málsøki frá landinum. Landið kann ikki krevja, at kommunurnar lækka íløgur og rakstur, samstundis sum tær skulu taka á seg nøkur av tyngstu vælferðarøkjunum. Tað er at blása og hava mjøl í munninum.

Tá eg sigi hetta, veit eg væl, at fíggjarætlanirnar hjá summum kommununum vísa munandi hægri íløgur, men hyggja vit eftir **roknskapunum**, so er *tað* veruliga støðið, heldur enn ætlanir, sum ikki vísa seg at halda.

Fíggjarviðurskifti hjá eini kommunu – og tær raðfestingar, ið kommunustýrið ger – er fyrst og fremst eitt mál millum kommununa og borgarar í kommununi. Hetta er fólkaræðið á staðnum, sum landsstýrið eigur at virða. Raðfestingarnar í kommununum hvørki kunnu ella skulu lagast eftir einum rokniarki í Fíggjarmálaráðnum, men vera grundaðar í tørvi og ynski borgaranna. Hetta er ein avgerandi fortreyt fyri javnari menning kring alt landið.

Sjálvsagt eru vit samd í, at tað úr einum búskaparligum sjónarmiði er skynsamt, at almennu íløgurnar eru rímiliga støðugar, og at almenni geirin ikki eigur at skunda undir, at vit fáa ov stór sveiggj í búskapinum. Men eftir okkara tykki er trupulleikin ikki kommunalu íløgurnar. Landið eigur tí at byrja við at hyggja eftir egnum raðfestingum.

## 3.4 Samstarv eigur at ganga báðar vegir

Kommunufelagið er altíð til reiðar at hava eitt uppbyggjandi samstarv við Fíggjarmálaráðið – eisini um felags stev, tá tað snýr seg um fíggjarviðurskifti. Men Kommunufelagið má samstundis staðfesta, at Fíggjarmálaráðið ikki hevur sýnt sama vilja til samstarv, tá ið onnur mál skulu avgreiðast. Mál, sum eru av stórum týdningi fyri kommunurnar.

Tá ið eldraøkið varð lagt kommununum at fyrisita, varð – sum eg longu havi nevnt omanfyri – ein avtalaður fíggingarleistur lagdur fyri løgtingið, sum ásetti, at kommunurnar skuldu fáa alla

forskattingina av pensjónum. Mett varð, at hetta skuldi geva kommununum inntøkur á 285 mió. kr.

Fyri at røkka eini upphædd á 398 mió. kr., sum var tað, ið økið tá var mett at kosta at reka, varð somuleiðis avtalað, at kommunurnar skuldu fáa skattliga virðið av ávísum skattafrádráttum endurrindað, svarandi til 113 mió. kr.

Ongantíð var nakar ivi í samráðingartilgongdini, hvørki í Fíggjarmálaráðnum ella í Kommunufelagnum um, at talan var um alla forskattingina av pensjónum.

Heldur eingin ivi var, tá ið uppskotið var til viðgerðar í løgtinginum ella í Fíggjarnevndini hjá løgtinginum. Talan var um alla forskatting av pensjónum.

Sum grundarlag undir útrokningum vóru tøl frá fíggjarskipan landsins og frá TAKS brúkt, og ongantíð var annað umrøtt enn, at øll forskattingin av pensjónum skuldi til kommunurnar.

Ikki fyrr enn í juni 2016 fær Kommunufelagið eina frágreiðing frá Fíggjarmálaráðnum um, at ráðið, uttan at umrøða málið við kommunurnar, hevur valt at halda kr. 400.000 aftur um mánaðin fyri at endurrinda reiðaríum undir DIS/FAS. Hetta hevur higartil kostað kommununum knappar 10 mió. kr.

Hetta er eftirfylgjandi broytt fyrisitingarliga í Fíggjarmálaráðnum.

Avtalað varð eisini, at skuldarloftið hjá kommununum skuldi hækka í sambandi við, at kommunurnar tóku yvir eldraøkið. Hetta er eyðsæð, tí kommunurnar hava við yvirtøkuni tikið á seg ein munandi íløgutørv frá landinum. Hetta vísir Búskaparráðið eisini á í seinastu frágreiðing síni. Tá ið kommunali búskapurin veksur við uml. 25%, so eigur lániloftið sjálvsagt, sum ein fylgja av hesum, at hækka samsvarandi. Men enn hevur Fíggjarmálaráðið ongar broytingar gjørt, hóast áhaldandi áheitanir frá kommunum.

Eitt annað óloyst mál í hesum sambandi eru lønarútreiðslur hjá Almannaverkinum fyri roknskaparárið 2014, sum kommunurnar hava verið noyddar at halda, hóast avtalað varð, at Almannaverkið skuldi avgreiða sínar skyldur, áðrenn økið gjørdist kommunalt.

At hetta eisini var løgtingsins vilji kemur greitt fram í álitinum frá Trivnaðarnevndini (Lgm 64 /2013) og Rættarnevndini (72/2013).

Men Fíggjarmálaráðið sýnir ongan vilja at loysa hesar trupulleikar, hóast áhaldandi áheitanir frá Kommunufelagnum.

## 3.5 Búskaparvøksturin endar fyrst og fremst í landskassanum

Vit hoyra javnan tíðindi um, at kommunurnar hava so nógv størri inntøkuvøkstur enn landið. Men inntøkuskatturin gevur okkum ikki einsamallur eina fullfíggjaða mynd av inntøku-grundarlagnum, tí bróðurparturin av inntøkunum hjá landinum er nevniliga frá øðrum skatti og avgjøldum, so sum MVG, punktgjøldum, tilfeingisgjøldum v.m.

Í svari frá landsstýriskvinnuni í fíggjarmálum uppá fyrispurning í løgtinginum um inntøkuskattin hjá landi og kommunum vísti hon m.a. á, at inntøkurnar hjá kommununum eru hækkaðar við 160% seinastu 25 árini, meðan landsins inntøkur "bert" eru hækkaðar við 90%.

Hon segði eitt nú, at inntøkurnar hjá landinum í 1997 vóru 3,4 ferðirnar hægri enn hjá kommunum, og at tær nú 25 ár seinni "bert" eru 2,5 ferðir hægri.

Við hesi lýsing av støðuni er lætt at fáa ta fatan, at kommunurnar eru raskari at fara niður í lummarnar hjá landsins borgarum.

Men í svarinum til fyrispurningin gloymdi landsstýriskvinnan at kunna um, at kommunurnar í hesum sama tíðarskeiði hava yvirtikið málsøki frá landinum, sum í dag kosta kommununum omanfyri 800 mió. kr. Talan er um útreiðslutung málsøki, so sum dagstovnaøkið (2001), stuðul til børn við serligum tørvi á dagstovnunum (2005), barnavernd (2005) og eldraøkið (2015).

Hyggja vit nærri at tølunum, ið landsstýriskvinnan leggur fram í sínum svari, er støðan tann, at inntøkurnar hjá landinum eru hækkaðar úr 3.352 mió. kr. í 1997 til 6.407 mió. kr. í dag. Harumframt hevur landið spart eina upphædd á 800 mió. kr. við at leggja kommununum málsøki  at fyrisita. Høvdu hesi øki framhaldandi verið hjá landinum, vóru inntøkurnar hjá landinum í dag sannlíkt uml. 7.207 mió. kr., svarandi til eina øking á 3.850 mió. kr. seinastu 25 árini.

Inntøkurnar hjá kommununum eru seinastu 25 árini hækkaðar frá 995 mió. kr. í 1997 til 2.560 mió. kr., sum er ein vøkstur á 1.565 mió. kr. Av hesum fara 800 mió. kr. til økini, sum eru yvirtikin frá landinum. Uttan hesi høvdu inntøkurnar hjá kommununum sannlíkt verið 1.760 mió. kr.,  sum er ein vøkstur á 765 mió. kr. seinastu 25 árini.

Við øðrum orðum hevur veruligi inntøkuvøksturin hjá kommununum seinastu 25 árini verið 765 mió. kr., meðan samsvarandi vøksturin hjá landinum hevur verið 3.850 mió. kr.

Tá ið landsstýriskvinnan letur vera við at upplýsa fyri tinginum, at málsøki fyri 800 mió. kr. eru flutt kommununum í nevnda tíðarskeiði, so gevur svarið okkum í mesta lagi hálvan sannleikan. (Mynd 6?)

## 3.6 Talgilding

Landsstýrið hevur nú gjørt av at seta ferð á arbeiðið at talgilda Føroyar. Í hesum sambandi var uppskot til løgtingslóg um Talgildu Føroyar sent felagnum til hoyringar. Sambært uppskotinum var ætlanin at lóggeva, at kommunurnar skulu fíggja omanfyri 25 mió. kr. av heildarætlanini yvir 3 ár.

Kommunufelagið góðtekur ikki, at løgtingið lóggevur niður í kommunukassarnar fyri at fíggja verkætlanina at talgilda Føroyar og mótmælti tí uppskotinum.  Kommunali leikluturin er óivað týdningarmikil fyri, at full nytta skal fáast burtur úr verkætlanini, men Kommunufelagið kann ikki taka undir við, at kommunur ímóti teirra vilja skulu tvingast til at taka lut. Tær kommunur,

ið ynskja at vera við frá byrjan at menna og fíggja verkætlanina, eiga at kunna tað, men tær kommunur, ið ikki ynskja at vera við longu nú, eiga at kunna bíða til seinni.

Ein stórur munur á landi og kommunum í hesum samanhangi er, at landið hevur lutfalsliga fáar, felags KT-skipanir at skipa saman við talgilding landsins, meðan kommunurnar hava nógvar ymiskar – ella ongar skipanir enn. Kommunurnar leiklutur er tí fyrst og fremst at talgilda tænastur og/ella at laga egnar skipanir til talgildingina. Hjá kommununum er hesin parturin allarhelst væl kostnaðartyngri enn hjá landinum.

Eftirspurningurin eftir talgildum tænastum fer ivaleyst at vaksa nógv komandi árini. Tað er tí ikki ein spurningur, um kommunurnar vilja taka lut í talgildingini, men heldur ein spurningur um *nær* og *hvussu* kommunurnar skulu verða partur av Talgildu Føroyum.

Kommunufelagið arbeiðir tí við møguleikanum fyri størri millumkommunalum samstarvi um KT-skipanir. Ætlanin er ikki at skipa ein stóran, etableraðan stovn til endamálið, men at skipa nakrar mannagongdir fyri felags kravseting, innkeypi og viðlíkahaldi av KT-skipanum. Endamálið er eisini at skipa felags upplæring og kravseting í mun til aðrar stovnar og myndugleikar. Samstarvið verður skipað við støði í verandi grundvølli hjá felagnum og eftir somu aðalreglum sum higartil – við at brúka ta vitan og teir førleikar, sum longu eru í kommununum og felagnum samanlagt.

Málið um Talgilding Føroya er enn eitt dømi um, at stevið millum Fíggjarmálaráðið og Kommunufelagið ikki er av tí besta. Hetta hevur ávirkan á samstarvsviljan hjá felagnum og kommununum við Fíggjarmálaráðið, sum í løtuni ikki er tann stóri.

Kommunufelagið hevur boðað Fíggjarmálaráðnum frá, at felagið ynskir allar trupulleikar við ráðið loystar, og ikki bert teir trupulleikar, sum Fíggjarmálaráðið ynskir at samstarva um.

## 4. Vælferðaruppgávur og kommunal samstørv

Fleiri stór og týðandi vælferðarøki eru, sum longu nevnt, løgd kommununum at fyrisita síðani fyrst í hesi øld. Fyrst dagstovnaøkið í 2001, síðani stuðul til børn við serligum tørvi á dagstovnum, barnaverndarøkið í 2005, og 1. januar í 2015 var seinasta stóra málsøkið, eldraøkið, lagt kommununum.

Dagstovnaøkið og stuðul til børn við serligum tørvi á dagstovnum vóru løgd kommununum uttan treytir, meðan treytir um millumkommunal samstørv vóru settar í sambandi við barnaverndar- og eldraøkið.

Hesar í kommunuhøpi nýggju tænasturnar gerast ein alsamt størri partur av kommunubúskapinum. Tað er tí av stórum týdningi at stýra hesi málsøki neyvt fíggjarliga og fyrisitingarliga.

Við eldraøkinum fingu vit 7 millumkommunal samstarvsøki umframt Tórshavnar kommuna, sum er 8. eldraøkið. Hetta er ein skipan, sum vit frammanundan kendu frá barnaverndartænastunum.

Í veruleikanum merkir hetta, at uppgávur fyri hundrað tals milliónir krónur í stóran mun liggja í fyrisitingarligum eindum uttanfyri kommunurnar. Og vit kunna við røttum siga, at vit eru í ferð við at byggja upp nýggjar fyrisitingarligar eindir, sum bygnaðarliga liggja ímillum land og kommunur.

Yvirskipað eiga vit at seta okkum spurningin, um tað er soleiðis, vit ynskja at skipa samfelagið bygnaðarliga. Tað er lítið at ivast í, at eitt bygnaðarligt millumlið millum land og kommunur er bæði dýrkandi og minni gjøgnumskygt enn ein bygnaður við tveimum samfelagsstigum. Fólkaræðisliga er heldur einki, ið talar fyri at skipa eitt ikki fólkavalt millumlið at fyrisita so stóran part av kommunubúskapinum.

## 4.1 At arbeiða fyribyrgjandi

Tá ið talan er um stór málsøki sum barna- og eldraøkið, er umráðandi at arbeiða fyribyrgjandi í øllum lutum. Tí fer Kommunufelagið at leggja størri dent á heilsufremjandi og fyribyrgjandi arbeiðið komandi árið, millum annað umvegis Barnaverndarstovuna og SSP samstarvið, og í samstarvi við aðrar stovnar og fyriskipanir, eitt nú Fólkaheilsuráðið.

Vit hava ofta sum politikarar lyndi til ikki at geva fyribyrgjandi arbeiðinum nóg stóran ans – helst tí, at vit her og nú ikki duga at síggja ein ítøkiligan ágóða ella úrslit av hesum arbeiði. Ofta sita vit upp afturá og illneitast um, at útreiðslurnar til vælferðarøkini tykjast vaksa skjótt. Men helst er tað so, at vit í veruleikanum kenna sviðan av, at ov lítið fyribyrgjandi arbeiði er gjørt millum børn, ung og eldri.

Henda gongd er tíbetur við at broytast, og vit gerast alsamt meira tilvitað um týdningin av fyribyrgjandi arbeiði.

Kommunufelagið hevur tí ætlanir um at skipa fyri evnisdøgum, har júst fyribyrgjandi arbeiðið í breiðum týdningi verður sett á skrá.

Landsstýriskvinnan í Heilsu- og innlendismálum hevur í hesum sambandi eisini ætlanir um at skipa eina verkætlan um at menna heilsutænastur í nærumhvørvinum hjá borgaranum – ein ætlan, sum vit í Kommunufelagnum bert kunnu fegnast um. Partur av hesi ætlan er at landið fult og heilt yvirtekur kommunulæknaskipanina, sum í dag partvíst er ábyrgd hjá landinum og partvíst hjá kommununum. Neyvari samráðingar verða í næstum um hesi viðurskifti.

## 4.2 Samstarv og stuðul

Ein arbeiðsbólkur við umboðum úr Vinnumálaráðnum, Kommunufelagnum og ferðavinnuni hevur í eina tíð arbeitt við einum uppskoti um, hvussu vit best skipa innlendis ferðavinnuna.

Høvuðsdenturin í almenna ferðavinnupolitikkinum hevur higartil fyrst og fremst verið lagdur á, at marknaðarføra Føroyar úti í heimi. Ein ætlan, sum hevur víst seg at rigga serstakliga væl, men sum nú gevur okkum stórar avbjóðingar á fleiri økjum, tí lítil orka er brúkt til eisini at menna skipaðar karmar og tilboð til tey mongu ferðafólkini, sum koma til landið.

Arbeiðsbólkurin er um at vera liðugur við sítt uppskot, og vit fáa væntandi eina frágreiðing áðrenn summarfrítíðina.

Kommunufelagið samstarvar eisini við Útlendingastovuna um eina verkætlan, sum skal gera kommunurnar kring landið betri førar fyri at taka ímóti útlendskum tilflytarum. Ætlanin er at gera eina vegleiðing til kommunur við kunning og góðum ráðum. Tilfarið verður bæði einfalt og alment, soleiðis at kommunurnar, uttan mun til stødd, kunnu nýta tað beinleiðis sum íblástur og tillaga tað til egin viðurskifti.

# 5. Aðrar deildir í Kommunufelagnum

Innan 1. januar 2014 høvdu vit tvey kommunufeløg. Hesi stovnsettu í felag Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og Barnaverndarstovu Føroya sum sjálvstøðug feløg. Tá ið kommunufeløgini blivið løgd saman í eitt felag, gjørdist virksemið hjá KAF og BVS partur av virkseminum hjá KF, og virka tey í dag sum sjálvstøðugar eindir í Kommunufelagnum. Harumframt er SSP, sum er samstarv millum land og kommunur, partur av virkseminum hjá Kommunufelagnum umvegis Barnaverndarstovuna.

## 5.1 Barnaverndarstova Føroya

Uppgávan hjá Barnaverndarstovuni er at ráðgeva, vegleiða og arbeiða fyri at styrkja og samskipa barnaverndarøkið í øllum landinum. Eins og undanfarna ár hevur verið arbeitt við at orða og seta í verk nýggjar leiðreglur og mannagongdir til barnaverndartænasturnar, og halda skeið í málsviðgerð. Eisini hevur Barnaverndarstovan saman við Eind 10 í Almannaverkinum skipað fyri sonevndum *mentaliseringsskeiðum*, ið venda sær til fólk ið arbeiða við børnum, ungum og vaksnum, ið hava verið fyri vansorgan.

Ein onnur uppgáva hjá Barnaverndarstovuni er at savna saman og umsita hagtøl á barnaverndarøkinum. Í 2016 varð avrátt, at niðurleggja telduskipanina, sum hevði verið brúkt til hetta endamál, tí tað vísti seg, at skipanin var ov tung at brúka og ov kostnaðarmikil at umsita. Í staðin fyri eina felagsskipan hevur nú hvørt einstakt øki ábyrgd fyri at savna tøl um barnaverndarvirksemið hjá sær sjálvum. Hesi tøl verða síðani send Barnaverndarstovuni, sum gera samlaða hagtalsfrágreiðing fyri alt landið.

Síðani 1. januar 2014 hevur Barnaverndarstovan eisini havt ábyrgdina av Barnahúsinum, hvørs høvuðsendamál at tryggja eitt gott og skipað tvørfakligt arbeiði við børnum og avvarðandi í

málum um harðskap og kynsligan ágang. Í mun til tal av málum tey bæði fyrstu árini var talið av barnahúsmálum lægri í 2016. Talan er tó um smá tøl, og tí ber ikki til at koma við endaligum niðurstøðum um støðuna í Føroyum eftir so fáum árum. Tó er væl hugsandi, at vit síggja fyrstu úrslitini av miðvísa upplýsingararbeiðinum hjá átakinum *Sig frá* og SSP. Tølini hjá Barnahúsinum vísa tó greitt, at harðskapur og kynsligur ágangur móti børnum og ungum tíverri javnan kemur fyri og tí er framhaldandi tørvur á einum Barnahúsi í Føroyum.

Fosturforeldraskipanin er ein týðandi partur av virkseminum hjá Barnaverndarstovuni. Á hvørjum ári verður skipað fyri grundskeiði fyri nýggjum fosturforeldrum, evniskvøldum og skeiðum fyri verandi fosturforeldur og regluligum vitjanum í fosturheimum. Tað verður gjørt eitt stórt arbeiði í barnaverndartænastunum at finna fosturfamiljur í familjuni ella í netverkinum hjá barninum. Tá hetta ikki letur seg gera, er neyðugt at finna fosturfamilju uttanfyri familjuna og netverkinum hjá barninum, og tað vísir seg ofta at vera torført, serliga í høvuðsstaðarøkinum. Haraftrat vísir tað seg, at børn, sum verða sett til fosturs, kunnu hava so stórar trupulleikar at stríðast við, at fosturforeldrini ofta hava tørv á meiri hjálp til hesa uppgávu, enn tey í dag fáa bjóðað frá skipanini.

## 5.2 SSP

SSP-ráðgevingin heldur til í Kommunuhúsinum. Skipanarliga er SSP partur av Barnaverndarstovuni og tí eisini Kommunufelagnum.

Fyrr í ár kunngjørdi Politiið í Føroyum hagtøl fyri lógarbrot hjá ungum undir 18 ár. Í 2006 vóru hesi 93 og í 2016 vóru 39 mál skrásett. Tá ið talan er um harðskap, er talið minkað heilt niður í 0. Sambært politinum er sannlíkt, at hesir sjónligu batar hava sín uppruna í arbeiðinum, ið gjørt verður í SSP.

Um vit fylgja ráðunum frá *Det Kriminalitetsforebyggende Råd* í Danmark, er ikki nóg mikið at gera átøk, ið eru kriminalitetsfyrbyrgjandi. Tá eru vit oftani ov sein á sjóvarfallinum.

Norðurlendsk gransking í, hvussu børn og ung megna lívið, er komin fram til, at ein lutfalsligur stórur bólkur, ikki fær tað burtur úr lívinum, ið varð væntað, og sum mistrívast. Roknað verður við, at talan er um eini 15 – 20 prosent, og verður hetta roknað til føroysk viðurskiftir, er talan um eini 2000 børn og ung, ið hava trega í lívinum, og sum kann ávirka lívsførleikar teirra sum vaksin.

Hyggja vit eftir hugtakinum fyribyrging, so er tað í roynd og veru at forða fyri eini óynsktari støðu. Tað almenna vil, at vit forða fyri, at fólk roykja, fremja kriminalitet, drekka ov illa, nýta rúsevni, eru fyri vanlukkum í ferðsluni, ágangi á sosialu miðlunum, kynsligum ágangi o.s.fr. Listin er alinlangur um hvørjar støður, vit ikki vilja hava. Tað legst bara afturat listanum, so vit eru um at missa ondina. Rákið er, at vit detta nærum um beinini á hvørjum øðrum í berari vælvild og egnum áhugamálum fyri at gera tað „góða“. Tí skulu vit, heldur enn at „sløkkja eldar“, leggja doyðin á tann uppbyggjandi partin, at menna okkara unga ættarlið til at verða

góðar samfelagsborgarar, ið bæði vísa fyrilit fyri sær sjálvum og tí samfelagi, tey eru partur av.

Endamálið er at skapa øllum í samfelagnum góð, trygg og mennandi kor. Ein viðkomandi táttur í uppbyggjandi liðinum í SSP er at hitta foreldur, møta børnum og ungum, har tey eru, og at skipa samband millum foreldur.

SPP hevur, eins og ein hvør onnur skipan, tørv á at fylgja við tíðini. Neyðugt er endurskoða fyribyrgjandi arbeiðið í SSP. Fyrst og fremst er neyðugt, at øll og allir tættir í samfelagnum eru partur av fyribyrgjandi arbeiðinum. Kriminaliteturin minkar, men samstundis hoyra vit og vita, at nógv børn og ung eru einsamøll, hava sálarligt órógv og hava ilt við at koma upp í part. SSP samstarvið eigur at geva sær far um at síggja heildarstøðuna og menna lívsførleikarnar hjá øllum børnum og ungum. Neyðugt er at tillaga okkum, so hugsað verður, at arbeiðið í SSP er ráðgeving í vælferð og trivnaði, og ikki bara at arbeiða við at minka um kriminalitetin.

Í løtuni er er ásett, at aldursbólkurin, ið SSP skal venda sær til, eru børn frá skúlabyrjan til 18 ár. Eitt ítøkiligt uppskot er um, at tað tvørprofessionella arbeiðið í SSP fevnir um **øll** børn og ung upp til 18 ár.

Fyri at tryggja, at vit hava neyðugu amboðini at síggja tað, vit skulu síggja, er "TÍTT – tiltøk í tøkum tíma" roynt í fleiri kommunum. Hettar er ein skipaður arbeiðsháttur við eygleiðingum, at síggja børn í viðkvæmari støðu og arbeiðsgongdum at hjálpa barninum og foreldrunum frá fyrsta degi av. Undirtøkan er so mikið góð, at arbeitt verður við at fáa TÍTT virkið kring alt landið.

Kommunurnar skapa í stóran mun karmar fyri gerandisdegnum hjá børnunum – á dagstovni, í skúla og við ymsum frítíðartilboðum. Á øllum hesum pallum má endamálið vera, at lívsførleikarnir hjá børnunum verða mentir á ein tilvitaðan og miðvísan hátt.

Fyri at fáa SPP at virka fullgott, er neyðugt við staðbundnari samskipan. Kommunurnar eiga ein sjálvsagdan leiklut í hesum og hava barnaverndartænasturnar kring landið ábyrgd av samskipanini.

## 5.3 Kommunala arbeiðsgevarafelagið

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið samráðist vegna limirnar við tey fakfeløg, ið hava sáttmála við felagið. Limirnir í dag eru Kommunufelagið, SEV og IRF.

Sáttmálasamráðingar fóru við nógvari tíð í 2016. Kommunala Arbeiðsgevarafelagið gjørdi semju við 7 fakfeløg.

At eldraøkið bleiv flutt til kommunurnar at umsita, hevur merkt arbeiðið hjá felagnum nógv. Við hesum er talið av kommunalum starvsfólkum eisini økt munandi.

Millum annað eru flestu limirnir hjá Heilsurøktarafelagnum og mest sum allir limirnir hjá Heilsuhjálparafelagnum nú kommunal starvsfólk. Kommunala Arbeiðsgevarafelagið valdi tí at gera felags sáttmála við hesi feløgini. Samráðingarnar við Heilsurøktarafelagið vóru hildnar saman við Fíggjarmálaráðnum. Hetta riggaði væl.

Av tí at bert fáir heilsuhjálparar nú starvast hjá landinum, valdi Fíggjarmálaráðið ikki longur at gera sáttmála við felag teirra. Fíggjarmálaráðið hevur avtalað við Heilsuhjálparafelagið, at starvsfólk hjá landinum framyvir verða sett sambært sáttmálanum hjá Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum.

Samráðingarnar við Heilsuhjálparafelagið gingu sum heild væl, men tóku rættiliga langa tíð. Tað eydnaðist at fáa loyst nøkur týdningarmikil viðurskifti. Hetta var serliga viðvíkjandi ásetingunum um eftirløn hjá tímaløntum, ið ikki sampakkaðu so væl við tvungnu eftirlønarinngjøldunum sambært eftirlønarlógini.

Umframt at samráðast, er uppgávan hjá Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum m.a. at flokka nýggj størv, samskipa lønarlagið, og ráðgeva limunum í spurningum um starvsfólkaviðurskifti. Mesta ráðgevingin hevur eisini í 2016 verið í spurningum viðvíkjandi lønarásetingum, sáttmálatulkingum og í mun til onnur starvsfólkamál.

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið hevur eisini hjálpt fleiri kommunum í setanarmálum. Almenn umrøða hevur seinastu árini verið um kommunalar setanir, ið ikki hava lokið øll krøv til mannagongdir o.l. Kommunurnar eiga at vera varugar við, at setanir eru avgerðir, ið skulu viðgerast bæði sambært galdandi sáttmálaásetingum og fyrisitingarrætti. Um limirnir hava ivamál í sambandi við starvsetanir, ber altíð til at ráðføra seg við Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Almennu/kommunalu sáttmálarnir fara úr gildi aftur 1. oktober 2017. Sáttmála-samráðingarnar fara tí at mynda stóran part av virkseminum hjá KAF komandi tíðina.

# 6. At enda

Nú eitt valskeið við nýggja kommunufelagnum er farið afturum, kunnu vit ásanna, at tað – hóast tað mangan er avbjóðandi at fevna so víða - ber til við einum góðum vilja.

Fyri mær er eingin ivi um, at saman standa vit sterkari. Størsta avbjóðingin er inneftir – at fáa skapt ein felagsskap, sum allar kommunur kenna seg aftur í og kenna seg at hoyra til. Tað er av størsta týdningi, at vit støðugt seta orð á ymisleikarnar, at vit tora at viðurkenna og umrøða teir – og at vit gera tað innanhýsis. Tí bert tá ber til at skapa tann felags grundvøllin, sum skal flyta okkum saman fram á leið.

Tað verða brotasjógvar komandi árini. Vælferðarsamfeløg kring allan heim hava stórar avbjóðingar, tí krøv og væntanir eru so stórar, samstundis sum vit verða færri bera útreiðslurnar.

At kommunurnar eru sjálvstøðugar, fólkaræðisligar eindir – og ikki bara fyrisitingarmyndugleikar og tænastuveitarar – tykist ofta vera trupult hjá serstakliga landsmyndugleikanum at viðurkenna. Tí mugu vit støðugt gera vart við okkara tilverugrundarlag og okkara sjálvsagda rætt til at ráða í egnum viðurskiftum.

Sum kommunufelag hava vit eina skyldu til áhaldandi at verja sjálvsavgerðarrættin hjá kommununum, soleiðis at eisini tey, ið eftir okkum koma, fara at hava tann framíhjárætt at skipa seg í lokalar eindir við heimildum at skipa og ávirka egin viðurskifti.

Í sanginum "Ljós yvir landið" eftir skaldinum Hans Andrias Djurhuus syngja vit:

*Stóðu vit saman, Føroya synir, sterkir,*
*kundu vit útint mangt eitt roysnisverkið,*
*kundu vit frama ført til Føroya landið.*
*Saman tí standi!*

Tað er mín vón, at vit, sum varða av fólkaræðisligu frumeind Føroya, megna at standa saman og í felag at flyta okkum framá – Føroya landi at frama.

Góðan aðalfund og eitt gott og gevandi komandi felagsár ynski eg okkum øllum.

Dennis Holm
Formaður

# 7. Skjøl til formansfrágreiðingina

**Mynd 1**: Valluttøka í 2008, 2012 og 2016



Framhald, mynd 1

| Kommunur | 2008 | | 2012 | | 2016 |
|---|---|---|---|---|---|
| Eiðis kommuna | 86,6 | | 87,82 | | 88,2 |
| Eystur kommuna | 84,4 | | 88,6 | | 87,8 |
| Fámjins kommuna | 88 | | 83,72 | | 95,9 |
| Fuglafjarðar kommuna | 84,7 | | 84,96 | | 90 |
| Fugloyar kommuna | 86,4 | | 94,44 | | 97,8 |
| Hovs kommuna | 82,8 | | 74,76 | | 89,5 |
| Húsar kommuna | 95,2 | | 74,36 | | - |
| Húsavíkar kommuna | 78,5 | | 86,54 | | 96,8 |
| Hvalbiar kommuna | 84 | | 81,93 | | 90,2 |
| Hvannasunds kommuna | 79,3 | | 79,02 | | 87,9 |
| Klaksvíkar kommuna | 81,9 | | 82,04 | | 87,4 |
| Kunoyar kommuna | 95 | | 80,2 | | 86,4 |
| Kvívíkar kommuna | 77,1 | | 77,7 | | 78,6 |
| Nes kommuna | 84,6 | | 84,19 | | 85,9 |
| Porkeris kommuna | 93,2 | | 91,02 | | 95,7 |
| Runavíkar kommuna | 79,8 | | 79,36 | | 85,6 |
| Sands kommuna | 91,1 | | 92 | | 94,3 |
| Sjóvar kommuna | 76,9 | | 81,08 | | 82,2 |
| Skálavíkar kommuna | 82,6 | | 77,78 | | 85,5 |
| Skopunar kommuna | 83,5 | | 87,04 | | 92,2 |
| Skúvoyar kommuna | 83,6 | | 88,37 | | 78,4 |
| Sumbiar kommuna | 90,1 | | 89,8 | | 89,3 |
| Sunda kommuna | 80,5 | | 79,01 | | 85,3 |
| Sørvágs kommuna | 84 | | 83,05 | | 83,6 |
| Tórshavnar kommuna | 72,4 | | 77,37 | | 79,2 |
| Tvøroyrar kommuna | 82,6 | | 83,33 | | 90,1 |
| Vága kommuna | 82,4 | | 82,21 | | 84,5 |
| Vágs kommuna | 80 | | 81,92 | | 87,8 |
| Vestmanna kommuna | 75 | | 77,11 | | 83,1 |
| Viðareiðis kommuna | 89,2 | | 90,43 | | 92,9 |

Í 26 av 29 kommunum var valluttøkan vaksandi frá 2012 til 2016

**Mynd 2: Fólkatalið í sýslunum 1900 til 2017, útvald ár**

| Sýsla | 1900 | 1925 | 1950 | 1975 | 2000 | 2017 | **%-vís broyting 1900-1950** | **%-vís broyting 1950-2017** | **%-vís broyting 1900-2017** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Norðoya | 1.763 | 2.644 | 4.448 | 5.655 | 5.810 | 5.992 | 152% | 35% | 240% |
| Eysturoyar | 3.440 | 5.243 | 6.988 | 8.831 | 9.995 | 11.069 | 103% | 58% | 222% |
| Streymoyar | 4.199 | 6.195 | 9.728 | 17.982 | 20.531 | 23.751 | 132% | 144% | 466% |
| Vága | 1.417 | 2.102 | 2.637 | 2.762 | 2.614 | 3.154 | 86% | 20% | 123% |
| Sandoyar | 1.178 | 1.510 | 1.712 | 1.700 | 1.445 | 1.287 | 45% | -25% | 9% |
| Suðuroyar | 3.027 | 5.141 | 6.268 | 5.685 | 4.958 | 4.611 | 107% | -26% | 52% |
| Føroyar | 15.024 | 22.835 | 31.781 | 42.615 | 45.353 | 49.864 | **112%** | **57%** | **232%** |

Framhald mynd 2: Fólkatal í sýslum sum % av samlaða fólkatalinum



**Mynd 3**


Index fyri inntøkur hjá kommunum innan og eftir at eldraøkið var lagt út
140
120
100
80
60
40
20
0
84
105
85
105
80
93
70
87
78
91
123
100
Norðoyggjar
Eysturoy
Sundalagið/N....
Sandoy
Suðuroy
Tórshavn
Index 1996
Index 2012
Mett 2014
Index 2016

**Mynd 3** framhald

| Kommuna | Index 1996 | Index 2012 | Mett 2014 | Index 2016 |
|---|---|---|---|---|
| Fugloy | | 152 | 169 | 193 |
| Viðareiði | | 75 | 79 | 98 |
| Hvannasund | | 88 | 89 | 83 |
| Klaksvíkar | | 99 | 101 | 106 |
| Kunoy | | 98 | 103 | 113 |
| Húsa | | 97 | 89 | |
| **Norðoyggjar** | **84** | **97** | **99** | **105** |
| Fuglafjørður | | 96 | 99 | 118 |
| Eystur | | 108 | 104 | 115 |
| Nes | | 93 | 94 | 89 |
| Runavík | | 96 | 96 | 102 |
| Sjóvar | | 87 | 94 | 94 |
| **Eysturoy** | 85 | 97 | 98 | 105 |
| Eiðis | | 100 | 101 | 90 |
| Sunda | | 93 | 95 | 94 |
| Kvívíkar | | 101 | 102 | 96 |
| Vestmanna | | 85 | 93 | 94 |
| Vága | | 91 | 95 | 88 |
| Sørvágs | | 97 | 104 | 98 |
| **Sundalagið/Norð streymoy** | 80 | 93 | 97 | 93 |
| Skopun | | 76 | 89 | 86 |
| Sands | | 70 | 88 | 80 |
| Skálavík | | 78 | 109 | 116 |
| Húsavík | | 75 | 107 | 107 |
| Skúvoy | | 79 | 101 | 103 |
| **Sandoy** | 70 | 74 | 93 | 87 |
| Hvalba | | 90 | 98 | 95 |
| Tvøroyri | | 90 | 94 | 92 |
| Fámjins | | 91 | 101 | 101 |
| Hovs | | 106 | 115 | 115 |
| Porkeris | | 87 | 97 | 97 |
| Vágs | | 82 | 90 | 89 |
| Sumbiar | | 82 | 94 | 91 |
| **Suðuroy** | 78 | 87 | 94 | 91 |
| **Tórshavn** | 123 | 110 | 104 | 100 |
| | 100 | 100 | 100 | 100 |

**Mynd 4:** kommunuskattaprosentið og barnafrádráttir í 2012 og 2017

| 2017 | Kommunu-skattur í % | Barnafrá-dráttur | 2012 | Kommunu-skattur í % | Barnafrá-dráttur | Munur, kommunu-skattur í % | Munur, Barnafrá-dráttur |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Fugloyar** | 16 | 10.000 | Fugloyar | 16 | 7.000 | 0 | 3.000 |
| **Viðareiðis** | 21 | 6.500 | Viðareiðis | 21,2 | 4.500 | -0,2 | 2.000 |
| **Hvannasunds** | 19,9 | 7.000 | Hvannasunds | 20,5 | 5.000 | -0,6 | 2.000 |
| **Klaksvíkar** | 20,75 | 5.500 | Klaksvíkar | 21,75 | 4.000 | -1 | 1.500 |
| **Kunoyar** | 18,5 | 7.000 | Kunoyar | 18 | 4.000 | 0,5 | 3.000 |
| **Fuglafjarðar** | 21,5 | 6.500 | Fuglafjarðar | 21,5 | 4.500 | 0 | 2.000 |
| **Eystur** | 21 | 7.500 | Eystur | 21 | 5.000 | 0 | 2.500 |
| **Nes** | 20,5 | 5.000 | Nes | 20,5 | 5.000 | 0 | 0 |
| **Runavíkar** | 22 | 5.000 | Runavíkar | 22 | 4.500 | 0 | 500 |
| **Sjóvar** | 21 | 6.000 | Sjóar | 21,5 | 4.500 | -0,5 | 1.500 |
| **Eiðis** | 18,75 | 7.500 | Eiðis | 21 | 6.000 | -2,25 | 1.500 |
| **Sunda** | 21,5 | 5.000 | Sunda | 21,5 | 5.000 | 0 | 0 |
| **Kvívíkar** | 20,75 | 4.000 | Kvívíkar | 21 | 4.000 | -0,25 | 0 |
| **Vestmanna** | 21,5 | 5.000 | Vestmanna | 23 | 4.000 | -1,5 | 1.000 |
| **Vága** | 22,5 | 5.500 | Vága | 22,5 | 4.000 | 0 | 1.500 |
| **Sørvágs** | 21,7 | 5.500 | Sørvágs | 21 | 4.000 | 0,7 | 1.500 |
| **Sands** | 22,5 | 8.500 | Sands | 23,5 | 6.000 | -1 | 2.500 |
| **Skopunar** | 22,75 | 6.000 | Skopunar | 23,5 | 6.000 | -0,75 | 0 |
| **Skálavíkar** | 22 | 6.000 | Skálavíkar | 21 | 5.500 | 1 | 500 |
| **Húsavíkar** | 21 | 5.000 | Húsavíkar | 21 | 5.000 | 0 | 0 |
| **Skúvoyar** | 16 | 8.000 | Skúvoyar | 16 | 3.000 | 0 | 5.000 |
| **Hvalbiar** | 20 | 6.500 | Hvalbiar | 20 | 5.000 | 0 | 1.500 |
| **Tvøroyrar** | 21,9 | 5.000 | Tvøroyrar | 23,5 | 5.000 | -1,6 | 0 |
| **Fámjins** | 19 | 7.000 | Fámjins | 19 | 6.000 | 0 | 1.000 |
| **Hovs** | 20 | 6.000 | Hovs | 20,5 | 5.000 | -0,5 | 1.000 |
| **Porkeris** | 20,75 | 7.000 | Porkeris | 21 | 5.500 | -0,25 | 1.500 |
| **Vágs** | 21,95 | 4.500 | Vágs | 23,25 | 4.000 | -1,3 | 500 |
| **Sumbiar** | 19 | 6.500 | Sumbiar | 20 | 5.500 | -1 | 1.000 |
| **Tórshavnar** | 19 | 8.000 | Tórshavnar | 20,75 | 5.500 | -1,75 | 2.500 |
| | | | | | | | |
| **Hægsta** | 22,75 | 10.000 | Hægsta | 23,5 | 7.000 | -0,75 | 3.000 |
| **Meðal** | 20,29 | 6.682 | Meðal | 21,34 | 4.956 | -1,05 | 1.726 |
| **Lægsta** | 16 | 4.000 | Lægsta | 16 | 3.000 | 0 | 1.000 |

Mynd 5

| Inntøkur/ár | 2000 | 2005 | 2010 | 2015 | Vøkstur | Yvirtikin øki | Veruligi vøksturin |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Land | 4.472 | 4.568 | 5.391 | 6.407 | 1.935 | 800 | 2.735 |
| Kommunur | 1.298 | 1.509 | 1.868 | 2.560 | 1.262 | -800 | 462 |

# Lógarmál til hoyringar hjá KF í árinum

| Skrásett | Uppskot | Slag | Frá |
|---|---|---|---|
| 14-03-2016 | Skrásett parlag, hjúnabandslógin | LB | Føroya Løgting |
| 16-03-2016 | Fíggjarlig frípláss, 2016 | KB | AMR |
| 19-04-2016 | Ferðslulógin, prutl, koyrikort v.m. | LL | SMR |
| 04-05-2016 | Heimatænasta og gjøld, endurskoðan | KB | AMR |
| 04-05-2016 | Tænastukeyp frá samstørvunum, landið | KB | AMR |
| 07-06-2016 | Revsi- og Tilhaldslógin | LL | Løgmansskrivstovan |
| 29-08-2016 | Váttað vekt av pakkaðum bingjum | KG | UVMR |
| 31-08-2016 | Vápn, goymsla v.m. | KB | Løgmansskrivstovan |
| 16-09-2016 | Skattalógin | LB | FMR |
| 21-09-2016 | Musikskúlin | LB | MMR |
| 28-09-2016 | Heimaframleiðsla | KG | UVMR |
| 18-10-2016 | Barlastarvatn | KG | HIMR |
| 10-11-2016 | Landsskjalasavnið | LB | MMR |
| 15-11-2016 | Tryggingar, genbrek | LB | Løgmansskrivstovan |
| 28-11-2016 | Endurvening hjá Almannaverkinum | KG | AMR |
| 05-12-2016 | Matvørulógin | LB | UVMR |
| 21-12-2016 | Sundhedsloven | KA | DK |
| | | | |
| 03-01-2017 | Akfars- og eigara upplýsingar | LB | SMR |
| 03-01-2017 | Ferðslulógin | KB | SMR |
| 03-01-2017 | Barnavernd, um privat samdøgursrøkt v.m. | LB | AMR |
| 04-01-2017 | Fólkayvirlit | KG | HIMR |
| 10-01-2017 | Havnaloðsing, frítøka smærri handilsskip | LB | UVMR |
| 20-01-2017 | Viðtaluhøli hjá kommunulæknum; støði | KB | HIMR |
| 30-01-2017 | Jarðhita-/elriknar hitapumpuskipanir | LB | HIMR |
| 31-01-2017 | Lønir um ársskiftið, tíðaravmarking í | Rundskriv | FMR |
| 20-02-2017 | Bókhaldslógin | LL | FMR |
| 21-02-2017 | Talgilding FO, fígging & kommunufulltrúin | LL | FMR |
| 27-02-2017 | Kommunustýrislógin, eftirlitsheimildir og | LB | HIMR |
| 28-02-2017 | Uppgerð av ársroknskapum | Rundskriv | FMR |
| 16-03-2017 | Døgnophold, uppskot til DK bekendtgørelse | BK | DK |
| 23-03-2017 | Uppalingarískoyti, bvs lógin | KG | AMR |
| 23-03-2017 | Politiviðtøkur | LB | Kommunur |
| 23-03-2017 | Kommunustýrislógin, alment útboð | LB | Føroya Løgting |
| 23-03-2017 | Skattalógin, botnfrádráttur í | LB | Føroya Løgting |

# Um Kommunufelagið

## Stýrið 2017

Stýri felagsins er mannað við borgarstjórum sambært §7 í viðtøkum KF:

Dennis Holm, formaður, Vágs kommuna
Heðin Zachariasen, næstformaður, Sunda kommuna
Annika Olsen, Tórshavnar kommuna
Artur Johansen, Sjóvar kommuna
Brandur Sandoy, Sands kommuna
Eyðdis Hartmann Niclasen, Vága kommuna
Jógvan Skorheim, Klaksvíkar kommuna
Jógvan í Skorini, Eiðis kommuna
Jóhan Christiansen, Eysturkommuna
Kristin Michelsen, Tvøroyrar kommuna
Pauli T Petersen, Vestmanna kommuna
Sonni á Horni, Fuglafjarðar kommuna
Torbjørn Jacobsen, Runavíkar kommuna

## Starvsfólkabólkurin 2017

Í bólkinum eru umsitingarleiðararnir sambært §8 í viðtøkum KF:

Formaður: Jákup Frants Larsen, Fuglafjarðar kommuna
Anna Joensen, Sjóvar kommuna
Bjørgfríð Ludvig, Tórshavnar kommuna
Dinna Jensen, Runavíkar kommuna
Erik Lervig, Eysturkommuna
Georg Hansen, Vága kommuna
Guðrun Ejdesgaard, Eiðis kommuna
Henrik Weihe Joensen, Tvøroyrar kommuna
Jógvan Kruse, Sunda kommuna
Marner Højsted, Sands kommuna
Maud Poulsen, Vestmanna kommuna
Petry Joensen, Vágs kommuna
Tummas T. Eliasen, Klaksvíkar kommuna

## Skrivstovan

Kommunufelagið
R. C. Effersøesgøta 26
100 Tórshavn
Telefon 30 24 80
www.kf.fo
kf@kf.fo

| Starvsfólk | Teldupostur: | Telefon: |
|---|---|---|
| Eyðun Christiansen, stjóri | eydunc@kf.fo | 282 480 |
| Jóhan Lamhauge, løgfrøðiligur ráðgevi | johanlam@kf.fo | 521 975 |
| Sveiney Sverrisdóttir, fulltrúi | sveiney@kf.fo | 590 760 |
| Armgarð Hammer, skrivari | armgard@kf.fo | 282 481 |
| Martin Johannessen, skrivstovufólk | martin@kf.fo | |
| Helena Joensen, reingerð | | |

# Viðtøkur fyri Kommunufelagið

**Navn, limaskapur og heimstaður**
**§ 1**. Navn felagsins er Kommunufelagið, og hevur felagið heimstað í Tórshavn

**§ 2**. Allar kommunur í Føroyum kunnu gerast limir.

**§ 3**. Upptøka av nýggjum limum verður góðkend á aðalfundi.

**Endamál**
**§ 4**. Endamál felagsins er at virka fyri felags áhugamálum, størri kommunalum sjálvræði, og betri samstarvi millum kommunurnar.

**Aðalfundurin**
**§ 5**. Aðalfundurin er hægsta vald felagsins.
*Stk. 2*. Borgarstjórin umboðar kommunustýrið til at taka avgerð á aðalfundinum. Aðrir kommunustýrislimir hava rætt at møta.
*Stk. 3*. Boðast skal til aðalfund við í minsta lagi 30 daga freist. Fundarskrá verður kunngjørd limakommununum í seinasta lagi 14 dagar innan aðalfundin.
*Stk. 4*. Limir, ið vilja hava mál til viðgerðar á aðalfundinum, senda felagnum hesi í minsta lagi 21 dagar innan aðalfundin.
*Stk. 5.* Á aðalfundi hevur hvør kommuna eina atkvøðu fyri hvønn íbúgva 1. januar undan aðalfundinum, tó so, at eingin kommuna hevur fleiri enn 45 % av samlaðu atkvøðunum.
*Stk. 6.* Er ikki annað tilskilað í hesum viðtøkum, verða avgerðir á aðalfundi tiknar við vanligum atkvøðumeiriluta.
*Stk. 7.* Aðalfundurin er viðtøkuførur, tá ið minst helvtin av limunum eru møttir.

**§ 6**. Ársaðalfundur verður hildin á hvørjum árið í seinasta lagi 30. apríl við hesi skrá:
a) Val av fundarstjóra.
b) Formaðurin letur frágreiðing um virksemi felagsins í farna árinum og um framtíðarætlanir felagsins.
c) Framløga av roknskapi til góðkenningar.
d) Val av grannskoðara.
e) Innkomin uppskot.
f) Ymiskt.
*Stk. 2*. Eykaaðalfundur verður hildin, tá ið stýrið heldur tað vera neyðugt, ella tá ið minst helmingurin av limakommununum skrivliga biðja um tað. Innkalling til eykaaðalfund fer fram á sama hátt og við somu freist, sum til vanligan aðalfund.

**Stýrið**
**§ 7**. Tá talan ikki er um mál, sum skulu viðgerast á aðalfundi, er ovasta leiðsla felagsins eitt stýri við 13 limum, sum er sett saman fyri 4 ár í senn. Stýrislimur skal vera borgarstjóri.
*Stk. 2.* Stýrið tekur við 1. januar eftir kommunustýrisval, og verður stýrið valt eftir hesi skipan:

- Norðuroyggjar (Klaksvík, Hvannasund, Viðareiði, Húsa k., Kunoy og Fugloy) 1 lim.
- Eystur Eysturoy (Fuglafjørður, Eystur k.) 2 limir.

- Vestur Eysturoy (Nes, Runavík, Sjóvar k.) 1 lim.
- Sundalagið (Sunda k. og Eiði) 1 lim.
- Streymoy (Tórshavn) 1 lim.
- Vesturstreymoy (Vestmanna og Kvívík) 1 lim.
- Vágar (Sørvágur, Vága k.) 1 lim.
- Sandoy (Sandur, Skopun, Skálavík, Húsavíkar k. og Skúvoy) 1 lim.
- Norður Suðuroy (Hvalba, Tvøroyri og Fámjin) 1 lim.
- Suður Suðuroy (Hov, Porkeri, Vágur og Sumba) 1lim.

Kommunustýrini í hvørjum einstøkum øki gera semju um at velja ein stýrislim. Semjast kommunurnar ikki um umboðanina, verður borgarstjórin í størstu kommununi umboð fyri økið.
*Stk. 3.* Kommunurnar sum sambært stk. 2 ikki fáa lim í stýrið, velja 2 umboð eftir hesum leisti.

- Kommunurnar við fleiri enn 750 íbúgvum velja sínámillum eitt umboð
- Kommunurnar við færri enn 750 íbúgvum velja sínámillum eitt umboð

*Stk. 4.* Tá ið valt verður sambært stk. 3, hevur hvør kommuna eina atkvøðu. Atkvøðugreiðslan fer fram eftir meirilutavalháttinum sambært § 2 í kommunustýrislógini.
*Stk. 5.* Stýrið skipar seg sjálvt við formanni og næstformanni eftir somu mannagongd, sum formaður og næstformaður verða valdir í kommunustýrum, tó so, at formaður og næstformaður verða valdir fyri 2 ár í senn.
*Stk. 6*. Stýrisfundur er viðtøkuførur, tá ið minsta lagi helmingurin av stýrislimunum eru møttir. Hvør stýrislimir hevur eina atkvøðu fyri hvønn íbúgva 1. januar í teimum kommununum, sum stýrislimurin umboðar. Tó so, eingin stýrislimir kann hava fleiri enn 45 % av samlaðu atkvøðunum.
*Stk. 7.* Avgerðir verða tiknar við vanligum atkvøðumeiriluta. Miðast skal tó ímóti, at stýrisavgerðir eru einmæltar.
*Stk. 8*. Stýrisfundur skal vera í minsta lagi eina ferð hvønn ársfjórðing. Formaðurin kann kalla stýrið til fundar, tá mál er, sum krevur stýrisavgerð, og sum ikki kann bíða til næsta regluliga fund. Stýrið kann eisini verða kallað saman, tá ið minst helmingurin av stýrislimunum skrivliga biðja um tað
*Stk. 9*. Fráboðan um stýrisfund verður send stýrislimum 14 dagar áðrenn fund.

**Starvsbólkurin**
**§ 8**. Í starvsbólkinum sita kommunuskrivararnir/-stjórarnir í teimum kommunum, sum hava umboð í stýrinum. Stýrið velur starvsbólkaformann fyri tvey ár í senn.
*Stk. 2*. Starvsbólkurin skal fyrireika mál, sum skulu viðgerast á stýris- og aðalfundi, og hann skal arbeiða við øllum málum, sum stýrið beinir til hansara.
*Stk. 3* Starvsbólkurin hevur vanliga fund eina ferð um mánaðin.
*Stk. 4*. Tó skal formaðurin kalla til fundar, hvørja ferð stýrisfundur er lýstur, um so er, at mál, sum skulu viðgerast har, ikki eru liðug fyrireikað.
*Stk. 5* Allir starvsbólkalimir skulu møta á stýrisfundum.
*Stk. 6*. Stýrisformaðurin skal hava fundarboð til hvønn starvsbólkafund.

**Skrivstovan**
**§ 9**. Stýrið setur og loysir úr starvi stjóra, ið hevur ábyrgdina mótvegis stýrinum, fyri at virksemi felagsins verður rikið sambært galdandi reglum.
*Stk. 2*. Stjórin hevur dagligu fyrisitingina av felagnum um hendi, og skal í samstarvi við starvsbólkin og stýrið umsita felagið innan fíggjarligu karmarnar og í samsvari við endamál felagsins.
*Stk. 3*. Stýrið ger starvsskipan fyri stjóran.
*Stk. 4.* Stjórin setur og loysir úr starvi onnur starvsfólk eftir ásetingum í starvsskipanini sambært stk. 3.
*Stk. 5*. Starvsbólkurin er dagliga bindiliðið millum stjóran og limakommunurnar.

**Fíggjarviðurskifti**
**§ 10**. Útreiðslurnar av at reka felagið verða goldnar av limakommununum. Limagjaldið verður ásett samsvarandi íbúgvaratalinum í kommununum 1. januar í tí ári, sum fíggjarætlanin verður samtykt. Tó kann eingin kommuna rinda meira enn 45 % av limagjaldinum.
*Stk. 2*. Stýrisformaðurin ger saman við starvsbólkaformanninum og stjóranum uppskot til fíggjarætlan fyri felagið komandi fíggjarár, sum hann fyrileggur stýrinum til góðkenningar í seinasta lagi í apríl ársfjórðingi.
*Stk. 3*. Áðrenn fíggjarætlan felagsins verður viðgjørd í stýrinum, skal starvsbólkurin hava gjørt sítt tilmæli.
*Stk. 4*. Limakommunurnar rinda í minsta lagi 1/12 part av limagjaldinum hvønn mánað til felagið.
*Stk. 5*. Eingin limakommuna heftir fyri skyldum felagsins við øðrum enn tí, sum avgjørt er at vera hennara partur av útreiðslunum, sambært fíggjarætlanini.
*Stk. 6*. Ongar avgerðir í málum, sum krevja kommunustýrissamtykt, eru bindandi fyri limakommunurnar, uttan tílík samtykt fyriliggur.

**Roknskapur**
**§ 11.** Stjórin hevur ábyrgd av roknskaparførsluni.
*Stk. 2*. Roknskapurin verður grannskoðaður av løggildum ella skrásettum grannskoðara.

**Aðrar ásetingar**
**§ 12**. Felagið verður teknað av stýrisformanninum og starvsbólkaformanninum ella stjóranum í felag, ella av tveimum stýrislimum saman við starvsbólkaformanninum ella stjóranum.

**§ 13**. Samtyktir um broytingar av viðtøkunum ella avtøku av felagnum skulu gerast av aðalfundinum. Í minsta lagið ¾ av atkvøðutalinum skulu vera umboðað, og uppskotið skal samtykkjast við 3/5 av greiddum atkvøðum.
*Stk. 2*. Er fundurin ikki viðtøkuførur, verður nýggjur fundur 14 dagar seinni, og er hesin viðtøkuførur uttan mun til, hvussu nógvar atkvøður eru umboðaðar. Samtykt skal tó vera við 3/5 av greiddum atkvøðum.

**§ 14**. Við minst 6 mánaða ávaring kann ein kommuna siga upp limaskap sín í felagnum til ein 1. januar.

*Stk. 2.* Kommunur, ið melda seg úr felagnum, hava einki krav móti felagnum ella ognum felagsins, og hefta ikki fyri skyldur felagsins.

**§ 15**. Verður felagið tikið av, falla ognirnar aftur til limakommunurnar í sama lutfalli, sum tær hava luttikið í útreiðslum felagsins seinasta roknskaparárið.

**Skiftisásetingar**
**§ 16.** Felagið tekur yvir øll rættindi og allar skyldur hjá KSF og FKF.

**§ 17.** Í samband við fyrsta valskeiðið, sum verður trý ár, tekur stýrið sjálvt avgerð um val av formanni og næstformanni sambært § 7, stk. 5, og viðvíkjandi val av starvsbólkaformanni sambært § 8, stk. 1.

**§ 18.** Limagjald fyri fyrsta roknskaparárið verður samtykt á stovnandi aðalfundi.

**Gildiskoma**
**§ 19**. Viðtøkur felagsins fáa gildi frá 1. januar 2014.

Samtykt á stovnandi aðalfundi 13. desember 2013

## Viðtøkur fyri Kommunala Arbeiðsgevarafelagið

**§ 1 Navn og limaskapur**
*Stk. 1.* Navn felagsins er Kommunala Arbeiðsgevarafelagið, stytt KAF.
*Stk. 2.* KAF er sjálvstøðugt limafelag undir Kommunufelagnum, stytt KF
*Stk. 3.* Limir í felagnum eru umframt KF, Elfelagið SEV, stytt SEV og L/F Interkommunali Renovatiónsfelagsskapurin, stytt IRF
*Stk. 4.* Heimstaður felagsins er Tórshavn

**§ 2 Endamál felagsins**
*Stk. 1.* Endamál felagsins er at fremja áhugamál limanna í øllum málum um lønar- og setanarviðurskifti starvsfólkanna. Hetta verður gjørt við at:
• samskipa lønarlagið og samráðast um sáttmála við starvsfólka- og fakfeløg, sum hava samráðingarrætt
• røkja áhugamál limanna í málum um lønar- og setanarviðurskifti, starvsmetingum, útbúgving o.a., og røkja samskifti við tey starvsfólka- og fakfeløg, sum samráðst verður við og myndugleikar annars, við neyðugum atliti til kommustýrislógina § 5, stk. 5.
• virka fyri og ansa eftir, at galdandi sáttmálar verða hildnir
• gera sítt til, at tað slepst undan trætumálum millum arbeiðsgevara og starvsfólk, ella um hetta ikki ber til, at royna at fáa tey loyst á friðarligan hátt, uttan arbeiðssteðg. Verður arbeiðssteðgur ella trætumál, røkir felagið, tá heitt verður á tað, mál arbeiðsgevaranna so langt, sum hóskandi verður hildið
• virka fyri, at trætumál limanna millum verða loyst
•við skeiðvirksemi ella á annan hátt upplýsa limir felagsins um viðurskifti, ið viðvíkja kommunalum/interkommunala arbeiðsgevara áhugamálum

**§ 3 Upptøka**
*Stk. 1.* KF og interkommunalir felagsskapir í Føroyum kunnu gerast limir við skrivliga at senda umsókn til nevnd felagsins.
*Stk. 2.* Limir í felagnum skriva undir viðtøkur felagsins, soleiðis sum tær eru, ella seinni á lógligan hátt kunnu verða broyttar

**§ 4 Útmeldan**
*Stk. 1.* Eingin kann siga seg úr felagnum, uttan við innskrivaðum brævi og við 6 mánaða freist.
*Stk. 2.* Hóast limur sigur seg úr felagnum, er hann framvegis bundin av galdandi sáttmálum, til hesir halda uppat.
*Stk. 3.* Limur, sum fer úr felagnum, hevur einki krav móti felagnum.

**§ 5 Ársfundur**
*Stk. 1.* Ársfundur verður hildin á hvørjum ári innan 1. mai.
*Stk. 2.* Nevndin í KAF hevur rætt til at luttaka á aðalfundinum hjá KF, men ikki skyldu at luttaka.
*Stk. 3.* Innkalling til ársfund verður gjørd í minsta lagi 14 dagar frammanundan.
*Stk. 4.* Saman við innkallingini verður sendur grannskoðaður roknskapur og onnur innkomin mál.

*Stk. 5.* Atkvøðurættur: KF hevur 4 atkvøður, SEV og IRF hava 1 atkvøðu hvør. Ársfundurin er viðtøkuførur, tá meira enn helmingurin av atkvøðutalinum eru umboðað. Allar avgerðir á ársfundinum verða tiknar við vanligum atkvøðumeiriluta.
*Stk. 6.* Mál, sum skulu viðgerast á ársfundinum, skulu vera KAF í hendi seinast 4 vikur undan ársfundinum. Uppskot frá øðrum enn nevndini skulu vera felagnum í hendi í so góðari tíð, at tey kunnu takast við í fundarfráboðanina, um tey skulu koma til viðgerðar á aðalfundi.
*Stk. 7.* Ársfundurin verður skipaður við hesi skrá:

a) Formaðurin skipar fyri vali av fundarstjóra
b) Formansfrágreiðing um virki felagsins í farna ári.
c) Framløga av grannskoðaðum roknskapi
d) Innkomin mál.
e) Ymiskt

**§ 6 Nevndin**
*Stk. 1.* Í nevndini sita 6 limir, sum verða valdir av nýggjum eftir hvørt kommunustýrisval og virka til nýggj nevnd er vald. KF velur 4 limir, meðan SEV og IRF velja hvør sín lim. Á sama hátt verða 6 varalimir tilnevndir.
*Stk. 2.* Nýggj nevnd tekur við so skjótt, sum allir limirnir eru tilnevndir, og í seinasta lagi 1. mai.
*Stk. 3.* Nevndin ger sína egnu starvsskipan.
*Stk. 4.* Nevndin velur sjálv formann og næstformann.
*Stk. 5.* Nevndarfundur er so ofta, sum formaðurin metir tað vera neyðugt, ella um ein nevndarlimur setir ynski fram um tað.
*Stk. 6.* Nevndin er viðtøkufør, tá meira enn helmingurin av nevndarlimunum eru á fundi.
*Stk. 7.* Hvør nevndarlimur hevur eina atkvøðu, og avgerðir verða tiknar við vanligum meiriluta.
*Stk. 8.* Um tað, sum fer fram á nevndarfundi, verður gjørd fundarfrágreiðing, sum allir nevndarlimir góðkenna.

**§ 7 Skrivstovan**
*Stk. 1.* Fyrisitingin í KAF er partur av fyrisitingini í KF.
*Stk. 2.* Ovasta fyrisitingarliga leiðsla felagsins er stjórin í KF. Stjórin setur og loysir úr starvi starvsfólk í KAF í samráð við nevnd felagsins.
*Stk. 3.* Í øllum málum sambært § 2 virkar fyrisitingin í KAF undir leiðslu av nevnd felagsins.
*Stk. 4.* Skrivstovuleiðarin í KAF hevur dagligu fyrisitingina av felagnum um hendi og skal í samstarvi við stjóran í KF og nevnd felagsins umsita felagið innan fíggjarligu karmarnar og í samsvari við endamál felagsins.

**§ 8 Limagjald**
*Stk. 1.* Tá nýggir limir verða upptiknir, skal samráðast um limagjaldið.
*Stk. 2.* Formaðurin ger saman við stjóranum í KF og skrivstovuleiðaranum í KAF uppskot til fíggjarætlan fyri komandi ár, harundir ásetan av limagjaldi. Formaðurin leggur uppskotið fyri nevndina til góðkenningar í seinasta lagi tann 1. juli.
*Stk. 3.* KF rindar 2/3 av ásetta limagjaldinum. SEV og IRF rinda 1/3 av ásetta limagjaldinum, og av hesum rindar SEV 2/3 og IRF 1/3.

*Stk. 4.* Eingin limur heftir fyri skyldum felagsins við øðrum enn tí, sum avgjørt er at vera hansara partur av útreiðslunum, sambært fíggjarætlanini.

**§ 9 Tekning**
*Stk. 1.* Felagið verður teknað av nevndarformanninum saman við einum nevndarlimi ella saman við skrivstovuleiðaranum fyri KAF.

**§ 10 Samráðingarnevnd**
*Stk. 1.* Nevndin tilnevnir umboð og formann í samráðingarnevnd. Við sáttmálasamráðingar, sum viðvíkja SEV og IRF, kann umboð frá nevndu felagsskapum luttaka sum partur av samráðingarnevndini. Annars kann samráðingarnevndin, eftir meting nevndarinnar, víðkast við umboðum fyri teir einstøku limirnar.
Samráðingarnevndin kann, um nevndin ynskir tað, leita sær sakkunnleika aðrastaðni.
*Stk. 2.* Uppgávan hjá samráðingarnevndini er at samráðast við tey starvsfólka- og fakfeløg, sum hava rætt til at samráðast um øll sáttmálaviðurskifti.
*Stk. 3.* Samráðingarnevndin ger sína egnu starvsskipan.

**§ 11 Roknskapur og grannskoðan**
*Stk. 1.* Roknskapurin hjá KAF er ein sjálvstøðugur roknskapur, sum er partur av roknskapinum hjá Kommunufelagnum og verður grannskoðaður, sum ein partur av hesum.
*Stk. 2.* Inntøkur og útreiðslur fyri KAF verða neyvt atskildar frá fíggjarviðurskiftunum hjá KF annars.

**§ 12 Tagnar- og upplýsingarskylda**
*Stk. 1.* Limir felagsins hava tagnarskyldu viðvíkjandi upplýsingum um innanhýsis viðurskifti í felagnum.
*Stk. 2.* Limirnir hava skyldu til, eftir áheitan frá nevndini, at lata teir upplýsingar, ið hava týdning fyri at kunna samráðast, umframt upplýsingar um lønar-, arbeiðs- og útbúgvingarviðurskifti fyri starvsfólkið. Hesir upplýsingar verða viðgjørdir í trúnaði.

**§ 13 Trætumál**
*Stk. 1.* Verður arbeiðssteðgur ella trætumál millum lim í felagnum og starvsfólk tess ella fakfelagið, binda hinir limirnir í felagnum seg at stuðla og hjálpa viðkomandi limi mest møguligt við m.a. at taka lut í móttiltøkum, sum nevndin í felagnum samtykkir at seta í verk.
*Stk. 2.* Allir limir binda seg til, um nevndin boðar frá tí, ikki at seta fólk hjá teimum limum í starv, har arbeiðssteðgur er, fyrr enn hann er hildin uppat.

**§ 14 Gerðarrættur**
*Stk. 1.* Trætumál millum felagið og lim kann leggjast fyri gerðarrætt.
*Stk. 2.* Í gerðarrættinum eru tveir limir, har felagið velur annan og limurin hin, umframt ástøðumann, sum verður tilnevndur av Føroya rætti.
*Stk. 3.* Avgerðin hjá gerðarrættinum er endalig og kann ikki leggjast fyri vanligu dómstólarnar.

**§ 15 Avtøka av felagnum**
*Stk. 1.* Felagið verður tikið av, tá ið minst ¾ av limunum ynskja tað.

*Stk. 2.* Verður felagið tikið av, verða ognir felagsins býttar millum limir felagsins á tann hátt, at miðaltalið fyri limagjaldið trý tey seinastu árini gevur lutfalstalið til hvønn lim.

**§ 16 Gildiskoma**
*Stk. 1.* Hesar viðtøkur fáa gildi, tá ið tær eru samtyktar á aðalfundi í KAF.

Tórshavn hin 12. mars 2014

## Viðtøkur fyri Barnaverndarstovu Føroya

**§ 1.** Barnaverndarstova Føroya er felagskommunalur stovnur, sum kommunurnar eiga.

**Endamál stovnsins**
**§ 2.** Barnaverndarstovan skal arbeiða fyri at styrkja og samskipa barnaverndarøkini úti um landið og seta á stovn og reka fosturforeldraskipan sambært ásetingunum í løgtingslóg nr. 18 frá 8. mars 2005 um barnavernd við seinni broytingum.

**Politisk leiðsla**
**§ 3.** Ovasta politiska leiðsla stovnsins er stýrið í Kommunufelagnum.

**Fyrisiting**
**§ 4.** Stjórin fyri KF setir leiðara at hava dagligu fyrisitingarligu og fakligu leiðsluna av Barnaverndarstovuni.
*Stk. 2.* Stjórin fyri KF letur gera starvsskipan fyri leiðaran.
*Stk. 3.* Stjórin í KF setur og loysir úr starvi øll starvsfólk á Barnaverndarstovuni
*Stk. 4.* Leiðarin fyri Barnaverndarstovuna vísir fyrisitingarliga til stjóran fyri Kommunufelagið.

**Fígging**
**§ 5.** Kommunufelagið rindar allar útreiðslur fyri Barnaverndarstovuna
*Stk. 2.* leiðarin ger saman við stjóranum innan 1 juli eina fíggjarætlan sum verður partur av samlaðu fíggjarætlanin hjá KF.

**Grannskoðan**
**§ 6.** Roknskapurin verður grannskoðaður, sum ein partur í roknskapinum hjá KF.

**Gildiskoma**
**§ 7.** Hesar viðtøkur koma í gildi 1. januar 2014.

**Skiftisáseting**
**§ 8.** Verandi nevnd fyri Barnaverndarstovuna – formenninir í KSF og FKF, áðrenn Kommunufelagið varð stovnað – halda áfram hetta valskeiðið til 1. januar 2017, men leggja øll mál av týdningi fyri stýrið í KF.

Tórshavn 17.01.2014

## 29. september 1967 ...

... sendi Klaksvíkar kommuna eitt bræv til kommunustýrini á Nesi, í Runavík, Gøtu, Fuglafirði, Hvannasundi og á Viðareiði við uppskoti um at fera ein kommunalan felagsskap við tí endamáli at styðja hvønnannan.

50 ár eru liðin, og síðani er samstarvið styrkt. Vit halda saman, stórar sym smáar kommunur, kring landið. Ein áhugaverd og fjøltáttað søga, sum byrjaði fyri skjótt 50 árum síðani. Og framvegis taka vit lógvatak, allar ...

## ... 29 kommunur í 2017

Kommunufelagið